Gamal kenningur vitjar aftur:

ESSO við í oljuleitingini við Føroyar


ESSO - dótturfelag hjá einum av heimsins størstu oljufeløgum, tí amerikanska Exxon, er eitt av teimum mongu útlendsku oljufeløgunum, sum er farið at vísa Føroyum størri og størri áhuga, nú mangt bendir á, at olja og gass er í undirgrundini. Nú um dagarnar vóru fleiri umboð fyri felagið á vitjan í Føroyum, har tey m.a. hittu umboð fyri oljufyrisiting og ráðleggingarnevnd. Eisini Tíðindablaðið Sosialurin var á staðnum.

Jan Müller

Tað var tann tíð, tá navnið ESSO var vanligt í gerandisdegnum í Føroyum. Men so bráddliga hvarv tað. Vit finna tað ikki aftur fyrr enn farið verður undir at bora í Lopra. Tá er nevniliga eitt av teimum áhugaðu feløgunum Esso.

Tað Esso, sum føroyingar kendu fyrr og sum sipað verður til her, var danska oljufelagið Esso, ið hevði oljutangar og sølu í Føroyum, og sum fyri nógvum árum síðani varð keypt upp av tí norska Statoil.

Nú er so aftur vent í holuni. Hesaferð er tað Esso í Bretlandi, sum er komið til Føroya - ikki við tí fyri eygað at seta upp tangar og selja olju - men harafturímóti í somu ørindum sum so mong onnur stór útlendsk oljufeløg: felagið vil vera við í oljuleitingini við Føroyar.



Dótturfelag hjá oljurisanum Exxon

Esso UK er bert eitt av mongu dótturfeløgunum - ella filialunum - hjá einum av heimsins størstu og elstu oljufeløgum, tí amerikanska Exxon.

Exxon, sum arbeiðir kring alla verðina, hevur meira enn 80.000 fólk í arbeiði, tað verið seg í sambandi við oljuleiting, framleiðslu, sølu og mangt mangt annað, sum hevur tilknýti til olju og gass.

Arbeitt verður í meira enn 50 londum og verður stórur dentur lagdur á leiting eftir olju og gassi í nýggjum økjum. Eitt av hesum nýggju økjunum er Atlantsmótið tvs. stóra økið millum Føroyar og Hetland.

Her er tað bretska dótturfelagið ESSO UK, sum stendur fyri arbeiðinum.

Esso er sera virkið í Norðsjónum og stendur í dag fyri umleið 10% av tí olju, sum verður framleidd í bretska partinum av Norðsjónum og landgrunninum annars.

Vísa Føroyum áhuga

Hyggja vit eftir gongdini vestan fyri Hetland, so kann ikki sigast, at Esso er millum tey mest virknu feløgini har. Felagið hevur gjørt fýra boringar í blokkunum 214,208,202 og 206 síðani 1984, ta seinastu í 1992.

Í fjør fekk Esso so tillutað ein nýggjan lisens í blokki 205, sum liggur rættiliga nær føroyska markinum.

Ætlanin er at fara undir royndarboringar har í hesum árinum. Boripallurin Transocean 8 skal brúkast til hesa boring.

Nú úrslitið av seismisku kanningunum við Føroyar hevur givið nógvum oljufeløgum blóð uppá tonnina er Esso eisini farið at vísa hesum nýggja økinum ans.

Tá oljufyrisitingin fyrr í ár skrivaði út til eina rúgvu av oljufeløgum og beyð teimum at vera við í boringini í Lopra var Esso eitt av feløgunum, sum tók av innbjóðingini. Og í dag er Esso eitt av teimum 19 feløgunum, sum eru við til at gjalda fyri Lopransboringina.

"Very early days"

Í farnu viku komu fimm fólk frá skrivstovuni hjá Esso í London til Føroya fyri at kunna seg við viðurskifti her tvs. tosa við umboð fyri oljufyrisiting og ráðleggingarnevnd og samtíðis eisini at greiða frá sær sjálvum, sínum royndum og ætlanum á økinum millum Føroyar og Hetland.

Millum tey fimm Esso-umboðini var eisini kanningarstjórin hjá felagnum í Bretlandi, Barbara McBride.

Tá Sosialurin spurdi hana, hví Esso nú aftur er at siggjast í Føroyum og hvi tey koma so mannsterk til landið svarar hon:

-Vit arbeiða vestan fyri Hetland og skulu til at bora har í summar. Føroyar liggja ikki so langt frá oljukeldunum har, so tað er nátúrligt at eitt oljufelag sum Esso, ið annars er sera virkið í oljuleiting kring alla verðina, eisini vil vera við her.

Men Barbara McBride, sum hevur drúgvar royndir hjá Exxon í Texas og sum seinastu árini hevur arbeitt hjá Esso í Bretlandi, ásannar tó, at "it is very early days yet", te. at enn er bert skjótil settur á í Føroyum, og tí er ilt at siga nakað ítøkiligt um bæði møguleikarnar at finna olju og um hvat eitt felag sum Esso fer at fyritaka sær í hesum økinum.

Men hon dylur ikki fyri, at Esso fylgir væl við gongdini við Føroyar og hava tey eisini havt høvi at hyggja eftir seismiskum tilfari, ið er skotið á føroyska økinum.

Esso hevur annars tann politikk at fara varisliga fram í nýggjum økjum, hóast stór orka verður løgd í jústat leita eftir olju og gassi í nýggjum økjum.

Spurd um hon heldur møguleiki er at finna bæði olju og gass við Føroyar sigur Barbara McBride, at hon ynskir ikki at úttala seg um hesar møguleikar enn, tí alt er so nýtt, men hon dylur ikki fyri, at møguleikin at finna gass er kanska størri enn at finna olju.


Esso heist við

Tað er greitt, at nú tá Esso er við í Lopra og tá fólk frá felagnum eru farin at lodda dýpið í Føroyum eitt nú um, hvussu ein komandi oljulóggáva, ein skattaskipan o.l. fer at siggja út, so kann roknast við, at hetta stóra oljufelagið fer at vera við, tá fyrsta útbjóðingarumfarið verður um ikki so langa tíð.


Hyggja vit so eftir virkseminum hjá Esso í Norðsjónum, so siggja vit, at felagið er sera virkið har og er við í fleiri av teimum stóru lisensunum, oftani saman við hinum risastóra oljufelagnum Shell.

Mynsturið hevur annars verið tað, at Shell og Esso hava arbeitt saman í mong ár og um eitt slíkt samarbeiði kann koma at fevna um føroyska økið eisini er óvist í dag. Men hvør veit.

Okkurt bendir í hvussu er á, at Esso er komið aftur til Føroya fyri at verða.



Soleiðis sum vit minnast Esso, tá tað var ein partur av býarmyndini í Havn.



Esso-interest oil and gas fields

Northern North Sea

Field	UK block	Share	Operator
Brent	211/29	50%	Shell
Dunlin	211/18	28.4%	Shell
South Cormorant	211/13	50%	Shell
North Cormorant	211/21	50%	Shell
Eider	211/23	50%	Shell
Tern	211/18	50%	Shell
Osprey	211/13	49.0%	Shell
Strathspey	211/23	13.2%	Texaco
Hudson	211/18	12.8%	Amerada Hess
Pelican	211/18	50%	Shell

Central North Sea

Field	UK block	Share	Operator
Forties	21/10	2.6%	BP
Auk	30/16	50%	Shell
Fulmar	30/16	42.9%	Shell
Clyde (3)	30/16	24.5%	BP
Kittiwake	30/16	50%	Shell
Gannet (4)	30/16	50%	Shell
Nelson	30/16	22%	Enterprise
Tiaw (2)	21/20	50%	Shell
Guillemot A	30/16	50%	Shell

Southern North Sea

Field	UK block	Share	Operator
Leman	49/26	25%	Shell
Indefatigable	49/27	25%	Shell
Sean (3)	49/28	25%	Shell
North Valiant	49/28	11.1%	Conoco
Clipper	49/26	50%	Shell
Barque	49/26	50%	Shell
Galleon	49/24	41.1%	Shell
Schooner	49/28	4.7%	Shell

Licences

Esso stendur fyri umleið 10% av olju- og gassframleiðsluni á bretska landgrunninum

Esso er dótturfelag hjá amerikanska oljurisanum Exxon

